# m Paulusar



gjørdur ein hylur, har hvønn morgun vórðu lagdar nýggjar blómur á blot fyri á tann hátt at fáa ein heldur frískari anga inni.

Og til at doyva tey ymisku, viðhvørt kanska heldur løgnu ljóð, ið hetta háttvirda ting lat frá sær, vórðu settir fýra tónleikarar, ein í hvørt horn í rúminum, sum so spældu ymsan tónleik, ið helst ljóðaði betri enn eymkanin frá kroystandi monnum, ið kanska ikki altíð høvdu líka lætt við at gera burtur av sær.

Àja. Vit koma so bragdlig her í fylgi og kappast um at fáa teir bestu sessirnar. Fólki so líkt. Hava heilt gloymt, at tann, sum setur seg sjálvan niðast, skal verða fluttur longri upp.

Freistandi at hugsa sær, at kanska hevur Lukas, evangelistur, á ferð síni við Paulusi í Efesos, sitið júst her og hugsað sær til frásøgnina um at sita ovarlaga ella niðarlaga, sum hann sigur frá í sínum 14. kapitli í evangeliinum.

Ein herligur tanki at gera sær. Men kanska ikki so heilt ósannlíkt kortini, at maðurin hevur sitið júst í hesum rúmi og gjørt síni ørindi.

Hvør veit, um ikki Paulus eisini onkran dag hevur sitið her og í einumhvørjum steðgi hjá tónleikarunum latið eitt orð falla um hendan nýggja átrúnaðin, hann er farin undir at boða her í Lítlu Asiu. Ikki so galið stað at bera vitnisburðin fram.



Ì eini marmorflís á veg niðan frá havnini, fekk tann komandi eyga á fyrstu lýsingartalvuna, sum segði frá, at helt hann fram sama veg, kom hann til ta kvinnuna, hann fyri pengar kundi vinna eitt hjarta frá



ytúsund ár eftir Paulus og Lukas hava sett seg á



Her á ráðhúsinum í Efesos hevur ivaleyst býarskrivarin, ið bjargaði Paulusi undan østum býarbúgvum, havt sína dagligu gongd



Múgvandi var tann rómverska kvinnan Scholastica, sm lat byggja ta stóru baðstovuna, sum enn í dag ber hennara navn

### Kjøtligir lystir

Her eru so nógv onnur tilboð í grannalagnum. Tilboð, sum tann vitjandi í dag í ávísan mun eisini kennir heiman ífrá. Summi betri enn onnur.

Ikki so langt hiðani, vit nú sita, tó uttan at hava loyst buksurnar, er kenda Scholastica baðstovan, sum serliga rómverjar hildu so nógv av.

Ein rættiliga stórur bygningur hevur hetta verið. Við bæði heitum og køldum baði. Dampin frá ketlunum hava teir leitt undir gólvinum, so gólvhita hava tey eisini havt í teirri tíðini. Og upp gjøgnum ventilar í gólvinum er dampurin so sleptur, so har hevur verið rættiligt dampbað inni.

Forgangarin til hesar turkisku baðstovurnar, sum í dag eru vorðnar so kendar millum ferðafólk, sum koma hendanveg, at ein mestsum kennir tað sum eina treyt at royna hetta.

Og fyri at vera heilt sannførur, má eg siga, at verri havi eg sjáld an kent meg reyvrendan enn eftir eina slíka vitjan í frítíðarbýnum, har vit búðu.

Kom til baðstovuna við stórum vónum til eitt upplivilsi av vælveru, sum eg væntaði mær. Út aftur komin hevði eg bara ta kenslu, at hetta var nakað uppreklamerað lort, sum eg einans hevði goldið eina rúgvu fyri.

Men annað er enn bað í grannalagnum. Næsti grannin er eitt tempul, nevnt Hadrian Templið eftir rómverska keisar anum, sum so fegin vildi hava sítt egna tempul, so hann kundi verða tilbiðin av undirsáttum sínum.

Men tann næsti bygningurin hevur ivaleyst fyri fleiri verið enn meira áhugaverdur. Tí har var bordell. Eitt rættiligt skøkjuhús, sum var góðkent sum einhvør onnur forrætning í býnum. Við egnari lýsingartalvu oman móti havnini. Ivaleyst teirri fyrstu av sínum slag í hvussu er í okkara parti av heiminum, halda ferðaleiðararnir.

Og søgurnar eru ymiskar um, hvussu vitjaninar í hesum bygninginum komu í lag. Tí hóast hetta var heilt natúrlig og viðurkend vinna, vóru ivaleyst ikki allar frúur í býnum, sum hildu, at hetta var nakað soleiðis at fara til. Og als ikki hjá monnum teirra.

Helst hava skøkjurnar kunna brúkst til okkurt skjólið eisini, eins og vit lesa um tær í Gamla Testamenti, har bæði njósnararnir hjá Josva og Samson vitjaðu slíkar.

Tí hóast hendan góða kvinna í Jeriko seinni hevur fingið orð á seg sum bjargari jødanna, er ikki heilt óhugsandi, at hesir menn, ið ferðast høvdu í ein mansaldur í oyðimørkini, vildu royna eitthvørt spennandi, nú teir knappliga stóðu í fremmandum landi, har eingin kendi teir.

Men hvussu Efesposmenn gjørdu síni ørindi í skøkjuhúsinum her millum bað, nátthús og tempul, fara vit at frætta nærri um í einum seinni parti av frásøgnini.